# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Átrúnaður og politikkur

Tað, sum er hent í seinastuni við Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, tykist standast av einum nýggjum ráki í føroyskum politikki. Tað, sum eyðkennir hetta rák er, at ávísir politikkarar og teirra veljarar orientera seg meira eftir átrúnaðarligum enn eftir politiskum linjum. Hetta rákið kom við núverandi Miðflokkinum og hevur hetta rákið støðugt vundið upp á seg.

Fyri nøkrum árum kunndu allir flokkar rúma øllum átrúnaðarligum áskoðanum, samkomum og fólkakirkjunar limum. Tað, sum var avgerandi, var politiska áskoðanin. Hetta var í tráð við meginreglu í okkara fólkaræði, sum snýr seg um, at vit býta okkum upp eftir okkara politiska og ikki eftir okkara átrúnaðarligu sjónarmiðum. Tað tykist, sum tann gamla demokratiska meginreglan um átrúnað fyri seg og politikk fyri seg er undir sterkt vaksandi trýsti. Við hesum nýggja ráki er føroyskur politikkur komin til eitt vegamót, sum allir teir gomlu flokkarnir mugu fyrihalda seg til.

Úrslitið av hesum nýggja ráki er eins týðuligt og tað er komið óvart á flokkarnar í hesum føri Sambandsflokk og Tjóðveldisflokk. Næstu ferð verður tað onkur annar flokkur, sum kemur at gera hesa royndina. Tað er ivasamt, hvørt hetta nýggja rákið gagnar fólkaræðinum. Hví skal løggávuvaldið nýtast við átrúnaðarligum endamáli? Skulu fólk við lóg noyðast til at hava ávísa trúgv ella til at trúgva tað sama sum politiska valdið? Var tað ikki júst hetta, at statsvaldið tvingaði fólk til ávísa trúgv, sum førdi til kúgan og trælkan í gomlum døgum? Er ikki átrúnaðarfrælsið í grundlógini ein ómissandi rættur hjá borgarunum i einum fólkaræði?

Tað er ikki vandaleyst, at føroyskur politikkur er við at flyta seg inn á hesa nýggju kós. Forsprákararnir eru harðmæltir, og tann, sum talar ímóti, kann skjótt verða stemplaður sum ógudiligur, sum er nakað av tí versta ein rættur føroyingur kann vera. Alfred Olsen og Karsten Hansen hava átikið sær eina sera stóra ábyrgd við at fara inn á hesa leið. Teir kunnu við avgerðum sínum slóða fyri einum valstríði, sum fer at snúgva seg um átrúnað heldur enn um politikk. Hetta er valla gagnligt fyri nakað og als ikki fyri demokratiið, sum er tað besta, ið vit eiga. Vit skulu ikki ferðast langt fyri at koma til lond og samfeløg, sum eru syndrað av beiskum átrúnaðarligum stríði og ósemjum. Er tað nakar, ið ynskir sær írsk ella balkanansk, fyri ikki um at tala irakisk viðurskifti her í okkara elskaða, friðarliga og djúpt kristna landi? Hví so blanda politikk og átrúnað? Hvør vinnur við hesum og hvat verður vunnið við at politisera átrúnaðarligu viðurskifti og trúarlív føroyinga? Hvønn rætt hava ávísir politikkarar og flokkar til at taka sær patent uppá kristindómin? Tað er ein spurningur, sum mong munnu seta sær í hesum døgum.

**Sosialurin**

## Umbering til Brynhild Thomsen



LENA L. MOHR
Blaðstjóri

Kvinna biður Brynhild Thomsen um umbering fyri mistak í nýggjastu Kvinnu nr. 1/2007. Av misgávum er navnið hjá Brynhild komið at standa við okkara egnu grein og manglar við tær greinarnar, sum hon hevur skrivað.

Brynhild Thomsen hevur nevniliga skrivað áhugaverdu greinarnar um Benju Stig Fagerland, Elisabeth Møller Jensen og Trine Gregorius. Her vantar hennara navn.

Brynhild hevur ikki skrivað innleiðandi tekstin við kunning um kvinnudagin 8. mars. Og av misgávum stendur hennara navn her.

Vit eru sera hørm um mistakið. Brynhild er ein sera dugnaligur og seriøsur journalistur. Vit vóna, at okkara mistak ikki fer at ávirka hennara umdømi negativa vegin. Hinvegin vóna vit, at góðu greinarnar undirstrika hennara dygdir sum journalistur.

Kvinna takkar Brynhild Thomsen fyri hennara stóra og væl úr hondum greidda arbeiðið. Umframt at skriva greinarnar, hevur Brynhild verið ein góður samstarvspartnari til at finna røttu nøvnini til Kvinnudagin 8. mars og til at gera samrøðurnar. Vit takka Brynhild fyri góða samstarvið og biðja orsaka mistakið.

## Ein útrætt hond til Fólkaskúlan



GERHARD LOGNBERG
Løgtingsmaður og borgarstjóri

Løgtingið hevði aðalorðaskifti um fólkaskúlan, og hevði eg fyrireikað meg til orðaskiftið.

Men eg kom ikki so langt, tí eg endaði á skaðastovuni, tí eg kom í eitt ferðsluóhapp.

Mær tykist, at í hesi orrustu loypa fólk upp, sum so ofta, og siga at einasta rætta er at leggja skúlan út til kommununar.

Hví skuldi tað verði tað rætta? Ikki tí, kommunurnar umsita meginpartin av skúlaverkinum.

Tær kommunur, sum hava verið tyngdar av lánsbyrðum, og sum ikki eru náddar niður, har ið landið krevur skuld at verða, fáa ikki loyvi at gera nakað við skúlan viðv. umbygging ella nýbygging.

Hetta er eitt sum má rættast, at kommunurnar gerða bestu karmar til børnini.

Síðani fari eg at skriva tað, sum skúlastýrið á Sandi vísti mær á, og kann eg ásanna tað sama frá Skopunar skúla.

Eg fari at skriva brævið so nøkurlunda, sum eg fekk tað. Her verður víst á, at hesi 10 árini hava børn í einum minni skúla fingið 600 til 800 tímar minni enn í einum størri skúla.

"Í fjølmiðlunum herfyri hoyrdu vit, at ført varð fram, at allir 1. flokkar í landinum hava sama tímatal. Men so er ikki. Vit eru foreldur, ið hava samanborið tímatalvur hjá okkara børnum við tímatalvur í øðrum skúlum, og har er munur á. Børnini í okkara skúla hava minni tímar um vikuna enn onnur børn í landinum.

Hvussu ið hetta verður roknað út í Mentamálaráðnum, kemur sum so ikki okkum foreldrum við, men vit eru eitt samt skúlastýrið, ið heitur á tykkum, um at gera eitthvørt við hesa støðu, so at vit eisini kunnu gera okkara til at vánaligu úrslitini hjá Pisa-kanningini fara at venda innan næstu kanning í 2009.

Sum er sigur Pisa-kanningin, at børn ið ganga á smærri skúlum klára seg verri enn børn, ið ganga á størri skúlum. Og mann ein av orsøkunum ikki vera tann, at børnini í smærri skúlunum hava færri tímar?

Eitt barn í 1. flokki í okkara skúla hevur 17 tímar, og tá fær tað deilda undirvísing, tað vil siga, at tað eru tveir flokkar í hvørjari stovu.

Um børnini í okkara skúla so hava minni tímar enn hini børnini í 10 skúlaár, so kann roknast út, at tey í hesi 10 árini verður tað til ein 600 – 800 undirvísingartímar.

Hetta er als ikki nøktandi, og hetta mótmæla vit harðliga!"

Sum vit síggja, so eru møguleikarnir nógv verri úti á minni skúla. Minni tímar tí flokkarnir eru 2 býttir.

Skúlarnir verða ikki gjørdir til tann tørv nútíðin krevur, tí sum áður nevnt, fáa kommunurnar ikki loyvi at lána til t.d. skúlar.

Hvussu er stætt við børnunum, sum krevja serundirvísing, vegna at tey eru sein?

Tað er ein kampur, sum ikki er at koma í gjøgnum.

Tímarnir til sertørv minka og minka. Ofta er svarið, at onkur skal koma og meta um næmingin, eftir at skúlastýrið hevur gjørt vart við henda stóra vanda.

Eg havi so upplivað, at spurt eftir nær hesin kemur, ella sum skriftin sigur, skulu vit vænta ein annan?.

Hesi viðurskifti skulu virka!

Tá tosað verður um, at børn skulu fyrr í skúla, so er mítt svar nei. Og um 10. flokkur skal strikast, so er mítt svar: Hann skal verða.

Til seinast. Formaðurin í Lærarafelagnum hevur verið nógv frammi, og hevur hann ein brennandi vilja fyri at fáa ein betur fólkaskúla, og eri eg so samdur við honum, at peningur skal á borðið. Álvaran við fólkaskúlanum eiga vit løgtingsfólk at taka til okkum.

So latið okkum øll rætta hendur út og vísa okkara besta vilja.

Lærarar, foreldur, skúlastýrið, kommunur og landið. Latið okkum gerða bestu karmar fyri okkara børn.

## Hjartaliga vælkomin inn í Miðflokkin Hansen!



VINJARD JOHANSEN
Varamaður á tingi

Eg fari at takka tær, at tú stóð fæst við tít val vegna grein 266B. Eg taki hattin av fyri einum manni, ið stendur við sítt orð.

Tað er gott at vita, at tú valdi Miðflokkin til tín flokk, sum hevur somu primeru mál sum tú sjálvur gongur inn fyri. Eg veit, at tú kemur at sigra við hesi avgerð, og vit fara at vaksa enn meir til komandi val, hvør veit, um vit ikki verða fýra ella enn fleiri.

Karsten, hjartaliga vælkomin inn í flokkin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.